LM-065/2025

LM-065/2025

From: Vár Berghamar Jacobsen <varberghamarjacobsen@gmail.com>
Sent: mánadagur, 26. januar 2026 08:58
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: Hoyringarsvar til Løgting Føroya

Til Løgtingið

Att: Hallur Markná

Viðlagt er hoyringarsvar frá mær.

Vinarliga

Vár Berghamar Jacobsen

Tlf 521162

Til løgtingið

Att: Hallur Markná, skrivari.

Hoyring 21. Jan 2026.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. (Flyta stuðulin til yrkisleiklist til Mentanargrunn Landsins, áseting um varalimir og aðrar smærri broytingar)

Takk fyri innbjóðingina at siga frá mínum sjónarmiðum.

Viðvíkjandi at broyta heiti frá Leiklistaráðið til Pallistaráðið

Fyrst havi eg hug at seta hesar spurningarnar:

Hvat vil man við navnabroytingini?

Hví vil man broyta?

Hvørjum tænir broytingin?

FYRI MEG ER HETTA RÆTTILIGA GRUNDLEGGJANDI: ORÐIÐ LEIKLIST

TAÐ KENNIST SUM AT MAN GER SEG INN Á SJÁLVT YRKIÐ (FAKIÐ) OG MESTSUM NIÐURLEGGUR TAÐ.

HETTA ER EITT FAK, SUM VIT EFTIRHONDINI ERU NÓGV, SUM HAVA TIKIÐ OKKARA LONGU ÚTBÚGVINGAR Í.

Viðv. heitinum: "Leiklistaráðið", so haldi eg tað vera eitt gott heiti, og eitt betri heiti enn "Palllistaráðið". Orðið leiklist hevur sín uppruna í sjónleiki, har orðið "leikur"/"leik" gongur aftur. Hvat heitið skal vera, velst eisini um hvør uppgávan hjá hesum "Ráð" er - og hvør uppgávan verður frameftir. Hetta má definerast áðrenn man fer at gera nakra navnabroyting.

Orðið palllist kann fevna um so sera nógv. Tað verður so breitt, og kann harvið eisini gerast trupult at definera. Hvat er definitiónin fyri palllist? Definitiónin er ógreið, og áðrenn man kann byrja at taka útgangsstøði í hesum orðinum, má orðið definerast. Hetta hevur eisini týdning tá tað umræður stuðulsumsóknir. Tí tey sum skulu viðgera tær mugu vita hvat orðið umfatar. Hinvegin er defintiónin fyri orðinum leiklist greið.

Reint málsliga, so byggja nógv orð, sum eru knýtt at leiklistini, á hetta orðið "**leik**" at "**leika**" sum leikstjóri, leikarar/sjónleikarar, leiklutur, leiktjøld, leikgripir. Enska orðið drama verður umsett til sjónleik/leiklist. Eg haldi tað hevur týdning at varðveita hesi orðini: sjónleik og sjónleikaran - og orðini leiklisti og leikari. Her eru fleiri dømir sum byggja á "leik" :

- Dramatist á enskum er á føroyskum: Leikrithøvundur
- Drama critic á enskum er á føroyskum: Sjónleikaummælari
- Dramatis personae á enskum er á føroyskum: Tey leikandi; leikaralisti
- Dramatization á enskum er á føroyskum: Leiktulkan, leikgerð
- Dramatize á enskum er á føroyskum: Leikbúgva, búgva til leik
- Drama training á enskum er á føroyskum: Sjónleikaraútbúgving, leiklistarútbúgving
- Dramaturgy á enskum er á føroyskum: Leiklistafrøði, sjónleikarafrøði, dramaturgi

Hetta er eitt lítið úrval.

Eisini orðið theatre í sínum ymsu formum verður á føroyskum til sjónleik og leiklist.
Theatre School er Leiklistarskúli.

EINGIN GRUND ER TIL AT TAKA BURTUR HEITIÐ "LEIKLIST", SUM LONGU ER TIL OG HEVUR VUNNIÐ HEVD.

Hvørt vit brúka orðið leiklist ella orðið palllist hevur eisini týdning tá vit hugsa um **stuðulsmøgulleikar.** Um høvuðsheitið er palllist, so kann leiklistin detta niður fyri um einki verður oyramerkt til leiklistina.

Hóast man ynskir at gera eitt felagsheitið fyri aðrar listagreinar, nýtist man ikki at inndraga leiklistina. Men heldur lata leiklistina tala fyri seg við sínum egna heiti, har orðið er væl definerað.

Fari at mæla til at varveita møgulleikan at søkja beinleiðis um stuðul til leiklist, og samstundis at gera eina nýggja játtan til aðrar og nýggjari listagreinar her heima, sum í skrivandi løtu, ikki eru beinleiðis nevndar og fevndar við oyramerktum studningi.

Hertil kemur, at tað hevur stóran týdning hvør tað er, sum viðgerð umsóknirnar til leiklist. At tað eru ráðgevar, sum kenna væl til yrkið og duga at síggja fyri sær møguleikar við einum komandi verki. Og vita hvat skal til fyri at fáa eitt leikrit ella eitt hugskot gjøgnumført til ein sjónleik, eina framførslu. Viðhvørt kunnu verk, sum í fyrstu syftu síggja út av nógvum fáa fyrimun, og aðrar týdningarmiklar og áhugaverdar søgur, sum kanska við fyrsta eygnakasti ikki síggja út av so nógvum, detta niðir fyri, verða ikki tiknar við, og vera ikki sæddar.

Haldi tað vera sera gleðiligt at vit í Føroyum alsamt fáa fleiri gávurík og útbúgvin listafólk sum framføra, eru nýskapandi, kannandi og vísa í verki nýggjar samstarvsmøguleikar.

Heldur enn at gera seg inn á orðið og yrkið leiklist, so snýr tað seg um at gera greiðar definitiónir og mannagongdir fyri stuðulsumførum, at gera nýggjar játtanir, at hækka játtanirnar og lofta hesi spennandi, sprettandi løtuni, sum vit listarliga eru í, tí fólkini eru her við dygdargóðum útbúgvingum, hugskotum og hug at fara til verka. Lat okkum vera við til at byggja upp eitt nýtt tíðarskeið við betri fortreytum, sum kunnu gagna tilgongd til yrkið, og draga talentini at listini, við nýggjum samstørvum og nýggjum íblástri til listaliga arbeiðið.

Viðvíkjandi at flyta stuðuls umsóknir frá Leiklistaráðnum til Mentanargrunn Landsins:

Tað eru fyrimunir og vansar við at flyta viðgerðina av umsóknum frá Leiklistaráðnum til Mentanargrunnin.

Mentanargrunnurin hevur ment ein nýggjan umsóknarportal í 2025, sum riggar sera væl. (Hesin háttur at søkja, ger tað greiðari hjá umsøkjaranum, og í útgangsstøðinum kann portalur ella líknandi loysn eitt nú verið brúkt í øðrum stuðuls grunnum og ráðum innan mentan og list.)

Tað hevur verið so, at leiklistaráðið umframt stjórin á Tjóðpallinum, sum er skrivari í leiklistaráðnum, fáa allar umsóknirnar um stuðul til yrkisleiklist. Sami stjóri, sum hevur Tjóðpallin at reka, fær eisini innlit í allar leiklistarligar verkætlanir, sum verður søkt um innan yrkisleiklist á fríyrkisøkinum. Tað vil siga at stjórin á Tjóðpallinum fær at vita hvørjar verkætlanir eru í umbúna og í væntu, og veit hvat søkt verður um, hvat verður stuðlað, hvat ikki verður stuðlað, og kann á henda hátt vera alvitandi á økinum. (Hetta hóast viðkomandi ikki hevur atkvøðurætt í samband við at taka støðu til hvør skal fáa stuðul. Stjórin fær hesa vitan og hesar upplýsingar um hvat er í umbúna innan yrkisleiklistina.) Tað er ikki rætt, at Tjóðpallastjórin fær innlit í hesar umsóknirnar hjá fríyrkisøkinum. Hetta má undir øllum umstøðum broytast.

Um tað skal vera Leiklistaráðið ella Mentanargrunnurin ella okkurt triðja, sum tekur støðu til stuðulsumsóknirnar, ja tað er spurningurin.

Um tað verður Mentanargrunnurin, ja so kann man siga at armslongdarprincippið verður tryggjað (yvirhildið) við at flyta viðgerðina av stuðli til fríyrkisleiklistina til mentanargrunnin, sum einsamalt kann taka avgerðina (uttan at tilmæli fer til landstýrisfólkið) – Armslongdar princippið kann tó eisini tryggjast á annan hátt. T.d. við at siga, at Landstýrisfólkið skal staðfesta tilmælini.

Mær dámar illa tá monopol líknandi støður kunnu taka seg upp:

Um stuðulsumsóknirnar verða fluttar til Mentanargrunnin, so verður tað hendan - til eina og hvørja tíð - sama nevnd, sum so fær enn størri innlit í alt sum fyriferst á mentanar - og lista økinum, ja næstan alt. Síggi ein møguligan vansa við at alt økið verður so sentrerað. Hendan monopol - líknandi støðan, hjá nevndini í Mentanargrunninum sum, tá alt kemur til alt, kann avgera hvør og hvat innan lista - og mentanarøkið skal fáa stuðul. (Hetta hóast fakfólk eru

inni og gera tilmæli, so er tað kortini nevndin, sum í síðsta enda tekur avgerðina og hevur ábyrgdina.)

Sum listafólk við hugskotum um nýggj verk er tað eisini viðkvæmt at lata tilfarið frá sær og loyva øðrum at gerast partur av hesum, sum bylgist í einum. Tað er av stórum týdningi at ansað verður væl eftir hesum umsóknum.

Eri takksom fyri at tað eisini eru kommunur sum t.d. Tórshavnar kommuna, sum veitir stuðul upp til 300.000 kr til størri listaverkætlanir. Hetta riggar stak væl, verður skjótt avgreitt og umsøkjarin fær skjótt svar. Hendan stuðuls skipanin virkar fyrimyndarligt. Vóni at tað eisini er so í øðrum kommunum í landinum.

Haldi at tað hevur týdning at viðgera fyrimunir og vansar gjølla áðrenn avgerð verður tikin hvørt stuðul til yrkisleiklist skal flytast til Mentanargrunnin. Og greiðar mannagongdir og definitiónir mugu gerast fyrst. Somuleiðis haldi eg tað eisini hava týdning at fakfólk/ ráðgevar, sum verða vald at viðgera umsóknir og gera tilmæli, sita í hægst 2 ár í senn. Eitt hugskot kundi verið fyrst at eftirmett hvussu tað riggar nú filmsumsóknirnar eru fluttar til Mentanargrunnin at umsita áðrenn Mentanargrunnurin fær fleiri økir at umsita.

Tað er jaligt, at leiklistin og aðrar listagreinar nú eru til viðgerðar. Men áðrenn lógarbroytingar verða framdar, mæli eg til at eftirmeta alt økið í síni heild, gera greiðar og týðiligar definitiónir fyri verandi og komandi ráð, feløg, grunnar o.s. fr. og tryggja at tað virkar eftir ætlan.

Vár Berghamar Jacobsen, leiklistafrøðingur, lærari í leiklist og leikstjóri.

Limur í Leiklistaráðnum eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya.